Skráseting Føroya

**Dagfesting**: 1. desember 2021

# Notat um fráboðan eftir hvítvasklógini

Notatið lýsir fráboðanarskyldu sbrt. hvítvasklógini í mun til fráboðanarskyldu sbrt. grannskoðaralógini, við serligum denti á ólóglig partaeigaralán. Eisini verður greitt frá, um nakað minstamark er á upphæddum, sum skulu fráboðast.

## 1. Fráboðanarskylda

**Stutt um partaeigaralán**

Vinnufelagalógin (VFL), § 210, stk. 1:

> *"Eitt kapitalfelag skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis lata pening vera til taks, veita lán ella veita trygd fyri kapitaleigarar ella leiðsluna í felagnum, sbr. tó §§ 211-214. Sama er galdandi í mun til kapitaleigarar ella leiðsluna í móðurfelagi felagsins og onnur virkir enn móðurfelagið, sum hava avgerandi ávirkan á felagið. 1. pkt er eisini galdandi fyri tey, ið eru knýtt at einum persóni, sum er fevndur av 1. ella 2. pkt. við hjúnabandi, við skyldskapi í stígandi ella fallandi linju, ella sum á annan hátt eru serliga nær."*[1]

Forarbeiðini til VFL, § 210, vísa til forarbeiðini til selskabsloven (SEL) í Danmark.[2]

Útgangsstøðið í VFL, § 210, er, at partaeigaralán eru ólóglig. Tó kann eitt partaeigaralán vera lógligt, um nakrar treytir eru loknar. Hetta útgangsstøðið varð broytt í Danmark við ríkislóg nr. 1547 í 2016,[3] so, at nú er útgangsstøðið í Danmark, at partaeigaralan eru lóglig, um treytirnar í SEL, § 210, stk. 2, eru loknar. Í praksis er tó sjáldan, at hesar treytir eru loknar, so um Erhvervsstyrelsen (ERST) fær fráboðan um partaeigaralán, verður felagsins roknskapur vanliga tikin út til eftirlit.[4]

Í Føroyum er útgangsstøðið framvegis, at partaeigaralán eru ólóglig, og tí leggur Skráseting Føroya seg uppat forarbeiðunum hoyrandi til ríkislóg nr. 470 frá 12. juni 2009.[5]

Brot á VFL, § 210, verður revsað við sekt, sbrt. VFL, § 319, stk. 1. Umframt hetta er galdandi, at eitt felag, sum ikki rættar avgerðir, tiknar í stríð við § 210, eisini verður revsað við sekt, sbrt. VFL, § 319, stk. 1, síðsta pkt.

---

[1] Løgtingslóg um parta- og smápartafeløg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021 (vinnufelagalógin)

[2] Sagsforløb 2008/1 LF 170, lovforslag som fremsat, særlige bemærkninger til § 210

[3] Ríkislóg nr. 1547 frá 13/12/2016

[4] https://erhvervsstyrelsen.dk/kapitalejerlaan:

> *"Det er således muligt under visse betingelser at yde lovlige kapitalejerlån. Erhvervsstyrelsens erfaring er dog, at kapitalejerlån i danske kapitalselskaber i langt de fleste tilfælde ikke opfylder de opstillede krav i selskabslovens § 210 stk. 2. Styrelsen vil derfor som udgangspunkt indlede en kontrolsag, hvis der i selskabets årsrapport er oplyst, at der er ydet lån til, eller stillet sikkerhed for en person eller virksomhed omfattet af selskabsloven § 210 stk. 1."*

[5] Sagsforløb 2008/1 LF 170, lovforslag som fremsat, særlige bemærkninger til § 210

**Fráboðanarskylda sambært hvítvasklógini**
Løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin – HVL), ið kom í gildi 1. juli 2021, áleggur persónum og fyritøkum (m.a. grannskoðarar, ognarmeklarar, skattaráðgevar, eksternar bókhaldarar og útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur) at fráboða til Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet (SØIK), um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Fráboðanarskyldan er ásett í § 25 í HVL.

HVL, § 3, allýsir hvítvask sum:

> *"1) Av órøttum at taka ímóti ella útvega sær ella øðrum part í fíggjarligum vinningi ella ognum, sum er fingin við revsiverdum lógarbroti.*
> *2) Av órøttum at krógva, varðveita, flyta, hjálpa við avhending ella á annan hátt seinni at virka fyri at tryggja fíggjarliga vinningin ella ognirnar frá einum revsiverdum lógarbroti.*
> *3) Roynd ella viðvirkan til slíkar gerðir.*
> *Stk. 2. Stk. 1 fevnir eisini um gerðir, framdar av tí, sum hevur framt revsiverda lógarbrotið, sum vinningurin ella ognirnar stava frá."*

Fráboðanarskyldan verður reguleráð í HVL, § 25:

> *"Fyritøkur og persónar skulu beinanvegin fráboða Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Sama er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við at kundin hevur roynt at gera eina transaktión ella eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at gjøgnumføra eina transaktión ella virksemi."*[6]

Forarbeiðini til HVL,[7] § 25, vísa til forarbeiðini til § 26 í hvidvaskloven í Danmark.[8] Serligu viðmerkingarnar til § 26 í hvidvaskloven greiða frá, at ásetingin setur í verk (gennemfører) artiklar 33-35 í 4. hvítvaskdirektivi.[9]

Talan er um eina fráboðanarskyldu hjá fyritøkum og persónum at fráboða til Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet (framyvir nevnt Hvidvasksekretariatet). Fyritøkur og persónar hava sostatt ikki eina skyldu at boða frá til Skráseting Føroya, sambært HVL, § 25.

Um Skráseting Føroya fær kunnleika til viðurskifti, sum gevur orsøk til at halda, at hesi kunnu hava tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi, sum er fevnt av fráboðanarskylduni í § 25, stk. 1, skal Skráseting Føroya boða Hvidvasksekretariatet frá, sbrt. HVL, § 27.

---

[6] Løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
[7] LM-017/2020 : Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
[8] Sagsforløb 2016/1 LF 41, lovforslag som fremsat, særlige bemærkninger til § 26
[9] EUROPA-PARLAMENTETS OG RÅDETS DIREKTIV (EU) 2015/849 af 20. maj 2015 om forebyggende foranstaltninger mod anvendelse af det finansielle system til hvidvask af penge eller finansiering af terrorisme, om ændring af Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 648/2012 og om ophævelse af Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2005/60/EF samt Kommissionens direktiv 2006/70/EF

Fortreytin fyri, at eitt ólógligt partaeigaralán er fevnt av fráboðanarskylduna í HVL, § 25, er, at fyritøkan ella persónurin “veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi.” Sama er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við at kundin hevur roynt at gera eina transaktión ella eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at gjøgnumføra eina transaktión ella virksemi.

Um fyritøkan ella persónurin hevur ein illgruna, sum ikki kann avváttast, so skal boðast frá til SØIK. Serligu viðmerkingarnar til § 26 í hvidvaskloven (javningi til HVL, § 25) siga, at:

> *“Hvis virksomheden eller personen ikke kan afkræfte mistanken, skal SØIK* [Hvidvasksekretariatet] *omgående underrettes. Virksomheder og personer omfattet af loven må derfor tilrettelægge deres behandling af mistænkelige transaktioner og aktiviteter på en sådan måde, at processen fra overvågning af kundetransaktioner, konstatering af noget mistænkeligt, undersøgelse og afklaring af, om mistanken kan anses for afkræftet, fremskyndes mest muligt. Dette må især gælde for transaktioner, der umiddelbart fremstår som mistænkelige. Underretningspligten kan ikke opfyldes ved fremsendelse til politiet.”*[10]

Í tráð við hetta, hevur ERST í Danmark viðmerkt, at viðurskifti eru fevnd av fráboðanarskylduni, um talan er um ein illgruna, sum ikki kann avváttast.[11]

**Fráboðanarskylda, sambært grannskoðaralógini**
Fráboðanarskyldan sambært grannskoðaralógini (GSL), ið viðvíkur fíggjarlig brotsverk, verður regulerað í GSL, § 20, stk. 1:

> *“Sær grannskoðarin, tá hann ger uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, at ein ella fleiri limir í leiðsluni hjá virkinum fremja ella hava framt fíggjarlig brotsverk í sambandi við sítt starv, og hevur grannskoðarin grundaðan illgruna um, at brotsverkið viðvíkur stórum upphæddum ella annars er av grovum slagi, skal grannskoðarin beinanvegin geva hvørjum einstøkum limi í leiðsluni boð um hetta. Fráboðanin verður skrivað í grannskoðanarprotokollina, um grannskoðarin førir eina slíka. Hevur leiðslan í seinasta lagi 14 dagar eftir hetta ikki skjalprógvað fyri grannskoðaranum, at hon hevur tikið neyðug stig til at steðga brotsverkum, ið fara fram, og til at bøta um teir skaðar, sum framdu brotsverkini hava elvt til, skal grannskoðarin beinanvegin boða Føroya Landfúta frá um tey fíggjarligu brotsverkini, sum illgruni er um. 1. - 3. pkt. eru ikki galdandi fyri viðurskifti, ið eru fevnd av reglunum í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme og av løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.”*[12] [bjartskrivað av undirritaða]

Forarbeiðini til GSL, § 20, nevna:

> *“Ásetingin regulerar skylduni hjá grannskoðara, at boða frá í sambandi við illgruna um fíggjarligt brotsverk, og verður víst til viðmerkingarnar til § 22 í uppskotinum til*

---

[10] Sagsforløb 2016/1 LF 41, lovforslag som fremsat, særlige bemærkninger til § 26
[11] https://erhvervsstyrelsen.dk/underretningspligt:
*”Der skal ske underretning til Hvidvasksekretariatet omgående, hvis virksomheden er vidende om, har mistanke om eller rimelig grund til at formode at en transaktion, midler eller aktivitet, har eller har haft tilknytning til hvidvask eller finansiering af terrorisme. Det er således tilstrækkeligt, at der alene er en mistanke, der ikke kan afkræftes.”*
[12] Løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021 (grannskoðaralógin)

*revirsorloven, sbr. skjali 1* [sí straks niðanfyri]. *Har tað í viðmerkingunum stendur „Statsadvokaten", skal hetta lesast sum „Føroya Landfúti".*[13]

Viðmerkingarnar til donsku revisorloven § 22 greiða frá, at:

> *"Forslagets § 22 viderefører den gældende lovs § 10, stk. 5-8, og indeholder bestemmelser vedrørende revisors rapporteringspligt ved formodning om økonomiske forbrydelser. Revisors rapporteringspligt gælder både i situationer, hvor revisor har til hensigt at afgive en erklæring med sikkerhed efter forslagets § 1, stk. 2, og i situationer, hvor revisor afgiver en erklæring uden sikkerhed efter forslagets § 1, stk. 3. Som det er tilfældet efter bestemmelsen i den gældende lovs § 10, stk. 5, er rapporteringspligten således ikke betinget af, at revisor skal udføre revision af en årsrapport for virksomheden. Efter forslagets stk. 1 skal revisor »indse«, at der begås kriminalitet »i tilknytning til ledelsens udførelse af dens hverv«. At det skal være sket »i tilknytning til ledelsens udførelse af dens hverv«, betyder som hidtil blot, at »privat« kriminalitet, begået uden tilknytning til virksomheden, ikke er omfattet af rapporteringspligten. At revisor skal »indse«, at der begås kriminalitet, betyder ikke, at revisor nødvendigvis skal være helt overbevist om, at der foreligger kriminalitet, men revisor skal anse det for klart mest sandsynligt, at der er tale om kriminalitet. Det er således ikke tilstrækkeligt, at revisor blot anser det for muligt, at der kan være tale om kriminalitet. Der vil endvidere kunne være tale om situationer, hvor f.eks. dokumenter i virksomheden ikke efterlader revisor med nogen rimelig tvivl om, at der foregår kriminalitet. Der skal endvidere være tale om, at revisor har en »begrundet formodning« om kriminelle forhold. En »begrundet formodning« foreligger ikke ved mistanke baseret på fornemmelser, men må kræve en mistanke, der dels hviler på dokumenterbart materiale og faktisk viden om forhold, der underbygger mistanken, dels har en sådan styrke, at det forekommer revisor mest sandsynligt, at der foreligger kriminel adfærd. Som i den gældende bestemmelse skal der være tale om forbrydelser vedrørende »betydelige beløb« eller forbrydelser, som i øvrigt er af »grov karakter«. Der tænkes primært på de groveste forbrydelser i straffeloven, som f.eks. underslæb, mandatsvig, bedrageri, databedrageri, skyldnersvig og skattesvig. Men også anden kriminalitet som f.eks. insiderhandel, kursmanipulation og bestikkelse, vil kunne udløse revisors rapporteringspligt. Som hidtil er »hvidvaskloven« ikke omfattet af forslaget, men har sin egen indberetningspligt. Stk. 2-4 viderefører ligeledes de allerede gældende bestemmelser om revisors rapporteringspligt, og der henvises herom til bemærkningerne til den gældende lov. Som hidtil gælder pligten til at underrette Statsadvokaten for særlig økonomisk kriminalitet* [Føroya Landfúti, føroysku forarb.], *jf. stk. 3, uanset om revisor, inden underretning er sket, skulle være blevet afsat som revisor for virksomheden."*[14]
> [bjartskrivað av undirritaða]

Talan er um eina fráboðanarskyldu til einstøku leiðslulimirnar í felagnum og møguliga Føroya Landfúta.

Sambært forarbeiðunum, skal grannskoðarin skal hava fyri eyga, at nakrar treytir skulu vera loknar, fyrr enn mál eru fevnd av fráboðanarskylduni í GSL. M.a. skal grannskoðarin hava grundaðan illgruna um, at brotsverkið viðvíkur stórum upphæddum ella annars er av grovum slagi.

Viðmerkingarnar staðfesta eisini, at hvítvasklógin ikki er fevnd av uppskotinum, men hevur sína egnu fráboðanarskyldu.

[13] LM-148/2008: Uppskot til løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin)
[14] Sagsforløb 2007/2 LF 120, serligu viðmerkingar til § 22

GSL, § 20, ásetur í síðsta pkt., at 1. - 3. pkt. eru ikki galdandi fyri viðurskifti, ið eru fevnd av reglunum í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme og av løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

**Greining og niðurstøða viðvíkjandi fráboðanarskyldu**
Eitt ólógligt partaeigaralán, eftir VFL, § 210, kann metast sum fevnt av hvítvaskallýsingini í HVL, § 3, stk. 1, nr. 1 og 3 (sí omanfyri), tí eitt ólógligt partaeigaralán er "av órøttum at taka ímóti ella útvega sær ella øðrum part í fíggjarligum vinningi ella ognum, sum er fingin við revsiverdum lógarbroti." Sum nevnt omanfyri, so er fortreytin fyri, at eitt ólógligt partaeigaralán er fevnt av fráboðanarskylduni í HVL, § 25, at fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at transaktiónin, fíggjarmiðlar ella virksemið hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Sama fráboðanarskylda er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við, at kundin hevur roynt at gera eina transaktión. Eisini er hetta galdandi í samband við eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at fremja eina transaktión ella virksemi, hóast kundin verður vístur burtur. Endiliga er fráboðanarskyldan galdandi, um illgruni ikki k

Sum nevnt omanfyri, ásetur GSL, § 20, í síðsta pkt., at 1. - 3. pkt. eru ikki galdandi fyri viðurskifti, ið eru fevnd av reglunum í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme og HVL. Tískil er fráboðanarskyldan í HVL, § 25, galdandi, um grannskoðarin "veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi". Sama er galdandi fyri royndir (forsøg). Grannskoðarin skal í slíkum førum fráboða sambært HVL, § 25 og ikki GSL.

## 2. Minstamark á upphædd, sum skal fráboðast

Serligu viðmerkingarnar til HVL, § 25, vísa til hvidvaskloven, § 26, sum setur í verk (gennemfører) artiklar 33-35 í 4. hvítvaskdirektivi.

4. hvítvaskdirektiv, art. 33, nr. 1, litra a, ásetur at:

> *"1. Medlemsstaterne pålægger forpligtede enheder [m.a. grannskoðarir, sí art. 2], og hvor det er relevant deres ledelse og ansatte, at samarbejde fuldt ud ved omgående:*
>
> *a) at informere FIU'en [EU's finansielle efterretningsenheder (Financial Intelligence Units)][15] på eget initiativ, herunder ved en indberetning, når den forpligtede enhed ved, har mistanke om eller har rimelig grund til at formode, at midler, uanset det pågældende beløbs størrelse, er udbytte fra kriminelle handlinger eller er forbundet med finansiering af terrorisme, og ved omgående at imødekomme FIU'ens anmodninger om yderligere oplysninger i sådanne tilfælde, og"*[16] [bjartskrivað av undirritaða]

[15] Í Danmark: Hvidvasksekretariatet (Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet) / Money Laundering Secretariat (State Prosecutor for Serious Economic and International Crime)
[16] EUROPA-PARLAMENTETS OG RÅDETS DIREKTIV (EU) 2015/849 af 20. maj 2015 om forebyggende foranstaltninger mod anvendelse af det finansielle system til hvidvask af penge eller finansiering af terrorisme, om ændring af Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 648/2012 og om ophævelse af Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2005/60/EF samt Kommissionens direktiv 2006/70/EF. Sí direktivið her. Sí samandrátt av direktivinum her.

Somuleiðis stendur í notu 37 í 4. hvítvaskdirektivi, at “Alle mistænkelige transaktioner, herunder forsøg på transaktioner, bør indberettes uanset transaktionens beløbsstørrelse.” [17]

Í tráð við hetta, hevur ERST í Danmark boðað frá, at:

> *“Underretning skal ske uanset størrelsen af det ulovlige kapitalejerlån, og uanset om lånet efterfølgende er tilbagebetalt eller skattemæssigt berigtiget.”* [18]

Ásetingarnar í føroysku hvítvasklógini eru innan fyri karmarnar av 4. hvítvaskdirektivinum, og tað kann tí leggjast til grund, at einki minstamark er á upphæddini, sum skal fráboðast Hvidvasksekretariatet. Tað hevur heldur ikki ávirkan á fráboðanarskylduna, um lánið er afturgoldið, ella, at viðurskiftini eru fingin í rættlag skattliga. Fyritøkan ella persónurin skal tí beinanvegin senda fráboðan til Hvidvasksekretariatet, uttan atlit til støðd á upphæddini og uttan atlit til, um viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Havast skal í huga, at hetta er galdandi, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi, sbrt. HVL, § 25. Sama er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við at kundin hevur roynt at gera eina transaktión ella eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at gjøgnumføra eina transaktión ella virksemi.

Tað kann tí staðfestast, at einki minstamark er, og tí skal Hvidvasksekretariatet fráboðast, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

[17] Ibid.
[18] https://erhvervsstyrelsen.dk/underretningspligt